# Flippa út millum kanónirnar

## Fyri fyrstu ferð verður skipað fyri einum Undirbeat-tiltaki á ólavsøku, har fólk sleppa at flippa út til elektroniskan tónleik á grøna grasinum millum kanónirnar á Skansanum







Bæði útlendskir og føroyskir DJ'arir fara á ólavsøku at leggja plátur á til Undirbeat-tiltak, sum verður á grøna grasinum millum kanónirnar á Skansanum.

– Vit hava fingið endaligu loyvini frá løgregluni, og tað eru vit sera fegin um. Skansin liggur passaliga langt frá miðøkinum, so fólk, sum ikki dáma hetta, sleppa frá at ilskast um ófriðin, sigur Sunneva Háberg Eysturstein, ið var við til at stovna felagið Undirbeat, ið er karmur og miðdepil fyri tey, sum hava áhuga fyri elektroniskum tónleiki í Føroyum.

### Útlendingar vitja

Undirbeat er sprottið úr elektronisku tónleikaframførsluni á Ground Zero, ið var partur av skránni av G!-festivalinum í fjør. Tiltakið fekk góða undirtøku. So góða, at fólk, eftir festivalin, ynsktu, at tað regluliga bleiv skipað fyri tílíkum tiltøkum. Úrslitið varð, at felagið Undirbeat varð stovnað, og skjótt fekst hølið í Cippo til vega, og í fleiri umførum hevur eydnast at fylt diskotekið í Havn.

Cippo hevur í seinastuni verið undir umbygging, og felagið hevur leitað eftir nýggjum og kanska meira hóskandi hølum. Í fyrstu syftu verður tað Skansin, sum skal leggja gras til tiltakið.

*Hetta verður neyvan seinasta tiltakið av hesum slag?*

– Nei, als ikki. Vónandi hilnast væl, so vit fáa blóð á tonnina. Ætlanin er í øllum førum, at hetta verður byrjanin til nógv meira elektroniskan tónleik í Føroyum, staðfestir Sunneva Háberg Eysturstein.

Skráin á ólavsøku verður fjølbroytt. Fyriskiparin sigur, at fremstu DJ'arnir her á landi framføra, meðan onkur útlendsk nøvn eisini vitja. Sunneva Háberg Eysturstein kann tó ikki seta nøvn á.

– Men eg kann vissa um, at úrvalið verður tað besta. Vónandi verður veðrið gott, so vit kunnu samla eina rúgvu av fólki. Sjálv havi eg verið til tílíkt í útlandinum, og fólk taka sera væl ímóti tí, sigur hon.

### Breiður áhugi

Í kjalarvørrinum á væleydnaðu Undirbeat-tiltøkunum hevur elektroniskur tónleikur í Føroyum tikið dik á seg. Ein rúgva av fólki samlast til larmandi, pumpandi og ferðmikla tónleikin. Harumframt hevur ein DJ-mentan, við nøvnum sum eitt nú DJ Knýtil, JamesJames og Steso, vundið upp á seg.

*Men hvørji fólk leita sær á Undirbeat?*

– Sjálvandi, so eru tað fyrst og fremst tey, sum dáma hetta slagið av tónleiki. Men so eru tað eisini tey, sum eru glað fyri at dansa. Tað er ikki soleiðis, at bara ávís fólk koma. Fleiri eru fyri at hugna sær og hava tað stuttligt, sigur Sunneva Háberg Eysturstein, sum slær fast, at eingin hyggur skeivt at teimum, sum vanliga ikki eru til Undirbeat.

*Tekstur: Uni Holm JohanneseMyndir: Astrid Mohr/Ditte M. Joensen*